Kalendari um rusk og burturkast

TÍÐINDASKRIV
IRF

Í nútíðarsamfelagnum fara broytingar fram á øllum økjum. Hetta hevur eisini ført við sær broytingar í samansetingini av ruski og burturkasti. Broytta samansetingin setur eisini nýggj krøv til viðgerð av ruski og burturkasti. Neyðugt er alla tíðina at meta um, hvussu best er at viðgera rusk og burturkast.

Neyðugt er tí við støðugari kunning um hvussu rusk og burturkast skal handfarast og burturbeinast. Kunningin kann gerast upp á ymsar mátar sum t.d. við eini røð av smærri faldarum, sum bóklingur, sum lýsingarherferðir ella á annan hátt.

IRF hevur valt at samansjóða ein kalendara og ein kunningarfaldara. Hvørt viku, leggur kalendarin eisini dent á at vísa, nær ymsu ruskposarnir vera heintaðir. Hetta verður gjørt í serstakari talvu ovast í høgra horni á hvørjari kalendarasíðu. Talvan knýtir vikunummarið í kalendaranum saman við, nær ið tann hvíti ella tann grøni posin verða heintaðir í ávísum økjum í landinum. Økini og nýtslan av kalendaranum eru lýst á fyrstu kunningarsíðuni. Tann hvíti ella tann grøni posin verða heintaðir sama dag, sum tann vanligi grái ruskposin verður heintaður.

Myndin á kalendarasíðuni saman við einum stuttum setningi niðast á breddanum vísa til, hvat verður umrøtt á kunningarsíðuni á arkinum t.d. Virkisøkið hjá IRF, Skiljing og endurnýtsla, Tann hvíti posin v.m. Á onkrum av kunn-

ingarsíðunum er skemtilig tekning ella faktagluggi.

Sum heild gevur kalendarin eina breiða kunning av virkseminum hjá IRF og eina vegleiðing um, hvussu rusk og burturkast skal handfarast. Kalendarin er tí hentur at hava hangandi á einum hóskandi stað alt 2002.

Hvørt ark er skipað sum ein kalendarasíða og ein kunningarsíða. Kalendarin kann sjálvandi nýtast sum ein vanligur kalendari, men harafturat eru hentir upplýsingar um mánastøður, halgi- og merkisdagar, nær klokkan skal flytast v.m. hongdir uppí.

Av tí at allir posarnir ikki verða heintaðir hvørja

Til minnis um

Dánjal Jóhannes Petersen

í Porkeri,

deyður hin 1. 1. 2002, bert 31 ára gamal

Við vónum bjørtum varð árið byrjað
og lukka havsbrúnni lýsti í,
á aldum spældi sær morgunroðin,
so fagurt litaði bø og líð.
Ein ungur maður seg leit í kring
so glaður var um Guds sjónarring.

Frá barni av var hann eygagóður
og vinur við alt á hesi jørð.
Í bø og haga so lættur, fróur,
tá sólin hitaði land og fjørð.
Ein lítil drongur so fimur rann,
við hundinum, meðan dagur svann.

Sum ungur drongur so væl hann royndist,
so trúfast mongum hann rætti hond.
Í spæli, arbeiði, altíð fúsur
frá fjallatindi til fjørustrond.
Ein vakur unglingi reystur gekk,
frá mongum manninum tøkk hann fekk.

Til mans hann kom, royndist sera treystur
og stuðul bleiv fyri heim og bygd.
Hann seyðin røkti og vísti hegni,
tók á seg ábyrgd og vísti dygd.
Ein álitsmaður á alistøð,
í hagastýri og grønum bø.

Í manndómi, blíður, hjartagóður,
at lætta um, har ið tung var leið.
Hjá faðir, móðir, ein dyggur stuðul,
frá systrum, bróður, hann aldri gleið.
Ein rættur maður, tók mangt eitt tak
at fjálga um har, sum bert var bak.

Ein ungur maður í kring seg lítur
nú morgunroðin so vakur er.
Hann brosar eymligt til sína kæru
- men bráddligt roðin í havið fer!
Ein maður - fluttur í himnasal,
her gráta vinir í hópatal!

J.

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður mín, faðir, verfaðir og abbi okkara

Árni Olsen,
f. 14. september 1922 – d. 7. desember 2001

doyði og varð jarðaður.

Takk tit, ið vóru um Árna á sjúkrahúsinum.

Takk til prestar, sangarar og tykkum, sum hjálptu til.
Takk øll tit, ið fylgdu.
Takk fyri blómur og kransar.

Takk tit mongu, ið lótu Sinnisbata og Javna eina gávu.

Takk fyri vøkur og uggandi minningarorð.

Elisabeth og synirnir

Filmur í Norðurlandahúsinum:

Jalla! Jalla!

Nú er at skunda sær. Longu mánakvøldið sýnur Norðurlandahúsið fyrsta filmin í nýggja árinum. Tað er svenski skemtifilmurin Jalla Jalla, sum júst er Oscar-tilnevndur

FILMUR
Norðurlandahúsið

Tey sum ferðast hava í heitaru londunum, kenna ivaleyst rópini Jalla Jalla. Orðini eru arabisk og merkja á okkara máli “Skund tær” ella “Kom nú” og bera brá av ótolni.

Rættuliga sjálvspeiandi er hetta eisini heiti á best umtókta filmi í Svøríki. Ikki færri enn 800.000 sviar hava higartil sæð skemtifilmin Jalla Jalla, sum tikin varð eftir 30 døgum í Svøríki og har flestu ættarfólk leikstjórans medvirkaðu. Nú er filmurin í uppskoti at vinna ein Oscar sum besti fremmandi filmur.

Svenska viðarlundin

Í filminum eru teir báðir Måns og Roro bestu vinir og arbeiða í eini svenskari viðarlund. Persónliga hava báðir sítt at stríðast við – Måns við konuna og Roro við libanesiska pápan, sum er farin undir at fyrireika brúdleypið hjá soninum. Ferð kemur á, tá Roro og ætlaða brúðurin Yasmin lata, sum um tey geva seg undir vilja faðirsins, tí so verður Yasmin ikki send aftur til Libanon at verða gift har.

Hesin fyrsti filmurin hjá Josef Fares hevur gingið sína sigursgongd í heimlandinum Svøríki, har hann er tann innlendski filmurin, sum hevur havt flestar áskoðarar seinastu mongu árini. At tað liggur raðið fyri hjá svenskum leikstjórum at gera skemtifilmar prógvar ikki minst filmurin Adam och Eva, og í so máta er Jalla Jalla heldur ikki nakað undantak.

Tvingsilshjúnalag

Fares gevur eina kærleiksfulla og sera fína mynd av einum ungum tilflytara og svensku tilveru hansara uttan á nakran hátt at gerast belærandi. Tað er ongantíð nakar ivi um, at handan

skemtið verða viðgjørd sera álvarslig evni, og filmurin er ein sera heppin roynd at gera ein skemtileik, ið lýsir kærleika, vinalag og tvingsulshjúnalag á ein virðiligan hátt.

Oscar virðisløn?

Sviar hava skotið upp, at filmurin Jalla Jalla fær Oscar virðisløn sum besti útlendski, ella ikki-amerikanski filmur í ár. Hinvegin vilja danir heldur at danski filmurin Italskt fyri byrjarar fær hesa virðisløn, meðan norðmenn heldur vilja at norski filmurin Elling eigur at fáa hesa ársins filmsvirðisløn.

Ein kappingarneyti hjá øllum verður tó helst franski filmurin Amélie frá Montmartre, sum fyri jól fekk fremstu evropeisku filmsvirðislønina. Tilsamans fimm filmar úr øllum luttakandi londunum sleppa at dystast um virðislønina.

Leikstjórin Josef Fares sigur, at tað hevði verið ótrúligt at vunnið. “Men helst er mín filmur alt ov stuttligur. Tað eru tyngri og álvarsamari filmar, ið vinna” sigur hann. Og her kunnu vit bara skoyta uppí vísu orð Otto Leisners, at einki er álvarsamari enn skemt og undirhald.

Hin 22. januar kemur filmurin Jalla Jalla á video og DVD-marknaðin. Men longu mánakvøldið 7. januar er høvi at síggja henda skemtiliga og hugvekjandi filmin á tí stóra løriftinum í Norðurlandahúsinum. Sýningin byrjar klokkan 19:30 og tað er filmsfelag Norðurlandahúsins KLIPP, sum skipar fyri.

Fundið hjá Hess týðandi fyri Føroya Kolvetni

Agip og Føroya Kolvetni fyrireika seg nú til at fara undir fyrstu boringina á landgrunninum. Borað verður helst í august í ár. Fundið, sum Hess hevur gjørt, kann eisini hava stóran týdning fyri Agip og Føroya Kolvetni

4. OLJUBORINGIN Á LANDGRUNNINUM
Jan Müller

At BP og Statoil einki funnu var ikki gott. Tað hevur tí hjálpt, at Hess hevur funnið olju, heldur Graham Stewart, nevndarformaður í Føroya Kolvetni. Tað hevur nevniliga ikki einki at siga fyri føroyska oljufelagið, at ábendingar eru um olju í undirgrundini, nú Føroya Kolvetni um stutta tíð (februar 2002) skal til at útvega sær millum 150 og 200 mill. kr. á altjóða fíggjarmarknaðinum.

– Hevði Hess eisini havt eitt turt hol, so hevði verið sera torført at varðveitt og ment áhugan fyri økinum. Men tað gevur okkum ein betri møguleika, at Hess hevur funnið nakað.



Møguleiki er fyri, at fundið Hess hevur gjørt, gongur inn í lisensin hjá Agip og Føroya Kolvetni (myrkabrúna økið)

Í dag eigur Føroya Kolvetni 7% lut í loyvinum, har Agip er fyristøðufelag, og í løtuni eigur tað 93% av loyvinum. Føroya Kolvetni hevur møguleika at økja sín lut upp í 22%, og er tað hesin vøkstur, sum m.a. skal fíggjast við partapengi á børsinum í London. Søgur hava gingið um, at Agip hevur fundast dúgliga við onnur oljufeløg um at “farma” inn í loyvið og taka ein part av tí stóra váðanum.

Graham Stewart, sum umframt at vera nevndarformaður í Føroya Kolvetni eisini hevur eina týðandi leiðsluuppgávu í bretska oljufelagnum Dana, hevur fylgt við gongdini í oljuvinnuni á Atlantsmótinum nú í nógv ár.

Sjálvur heldur hann, at fólk hava stórar vónir til hetta økið. At BP so ikki fann tað teir roknaðu við ger, at teir mugu endurskoða alt. Tað var vissuliga ein skelkur fyri felagið, at hvørki Svínoyarbrunnurin ella Assyntbrunnurin góvu nakað úrslit.

Sosialurin skilur, at tað, Hess hevur funnið, er so stórt, at tað møguliga gongur bæði út í bretskt øki og í loyvi hjá Agip og Føroya Kolvetni í føroyska økinum. Er tað so, so kann man siga, at olja longu er funnin í økinum hjá Føroya Kolvetni.

Tað, sum Hess hevur funnið liggur fáar kilometrar frá loyvinum 002 hjá Føroya Kolvetni. Sosialurin skilir, at tað í loyvinum hjá Agip og Føroya Kolvetni finnast fleiri prospekt at bora í, umframt at Hess-fundið møguliga eisini røkkur inn í teirra økið.

Graham Stewart hevur annars ikki hug til at gera viðmerkingar til einstøku boringarnar, men metir tað ikki vera óhugsandi, at BP kanska eisini fer at bora djúpri næstu ferð, nú Hess hevur rakt við kolvetni á so djúpum stað.

Hann viðgongur, at mong í oljuverðini blivu heilt tikin á bóli, tá tað gjørdist greitt, at Statoil og BP høvdu borað turt, og tí má man til at hugsa u,m hvussu man veruliga hevur arbeitt. Hvat man hevur gjørt skeivt. Sosialurin skilur, at Agip hevur fingið fleiri tilboð um leigu av boripallum. Eftir øllum at døma verður farið at bora í august í ár. Við øðrum orðum gera feløgini neyðugu fyrireikingarnar, og tað er í hesum sambandi, at nýggi seismikkurin skal gera Agip betri ført fyri at finna skilabesta prospektið at bora eftir.

Leiðslan í Agip her saman við leiðsluni í Føroya Kolvetni. Farið verður at bora í august. Mynd Jan Múller

RESTORFFS BRYGGJARÍ

Sum nýggjur høvuðspartaeigari í PF RESTORFFS BRYGGJARÍ vil Spf Camelot halda fram við teimum gomlu traditiónínum hjá Føroya elsta framleiðslufelag. Vit fara tó at nútímansgera marknaðarføringina og kundarøktina soleiðis at Restorffs navnið verður enn sjónligari í gøtumyndini við sínum vælsmakkandi dygdarframleiðslum.

Restorffs fór undir sína framleiðslu í 1849 og er sostatt millum tey elstu bryggjaríðini í Norðurlondum. Umframt at røkja tann týdningarmikla føroyska heimamarknaðin til fulnar fer Restorff eisini at kanna møguleikarnar fyri útflutningi, tí tað bleyta føroyska vatnið er framúr væleignað til bjór og sodavatn.

Vit frætta sera fegin frá fólki sum vita eitthvørt um søguna hjá Restorff, um starvsfólk, um framleiðslur og sum kanska eiga gamlar myndir og etikettir vit kundu lánt. Vit eru ikki vís í um tað er William Heinesen ella Jákup Olsen sum hava teknað okkara núverandi búmerki; kanska onkur kann hjálpa við hesum ivamáli?

Sum hagartil fer Restorffs at stuðla ítrótti og mentanarlívi. Skúlaflokkar og onnur áhugaði eru sera vælkomin at síggja hvussu eitt bryggjarí arbeiðir. Um onkur hevur hugskot til ábøtur ella nýggjar framleiðslur frætta vit fegin.

Hjálpið okkum við tí góða smakkinum, okkara ambitiónir eru stórar !

Restorffs

The National Brewery Since 1849